# ørsti Shaky-fjeppari

*Magni Christiansen (høgrumegin) hittir sína stóru fyrimynd úr áttatiárunum, tá hann eisini sjálvur fór at spæla tónleik. Shakin´ Stevens var bæði blíður og fyrikomandi, tá fjepparin bað hann um at signera ein stóran bunka av fløgum, ið hann hevði við sær*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



ið so at siga hevur spesialiserað seg í Shakin´ Stevens.

## Savnar plátur

- Eg eri 100 prosent sikkur í, at eg eri tann størsti Shakin´ Stevens fjepparin í Føroyum, sigur Magni Christiansen eftir at hava hitt Shaky í livandi líki.

Magni eigur ein hóp av plátum og fløgum hjá Shaky, og hann hevur eisini tikið fleiri av teimum við niðan á Hotel Føroyar hetta kvøldið, so at Shakin´ Stevens sjálvur kann signera tær.

Shaky er hjálpsamur og skrivar sín autograf á allar pláturnar og fløgurnar. Tó er tað ein fløga, ið hann ikki vil signera, og tað er ein kopi-fløga av Shakin´ Stevens and The Sunsets. Hetta var bólkurin, ið hann spældi við í seksti- og sjeytiárunum.

Magni Christiansen eigur eina plátu, ið bert er útgivin í tvey hundrað eintøkum. Hetta er ein pláta, har Shakin´ Stevens syngur cover-løg hjá Elvis og øðrum kendum sangarum úr seksti-árunum.

- Hetta er ein ræðulig pláta tónleikaliga, men hon er stuttlig at eiga kortini. Eg keypti hava fyri 200 krónur frá einum týskum fjeppara-bólki, men eg hevði kunnað selt hana fyri mangt slíkt í dag, greiðir hann frá.

Lítla løtu eftir at Shaky sjálvur er farin inn á kamarið, kemur umboðskvinna hansara aftur og gevur Magna Christiansen nýggjastu stakfløguna hjá Shakin´ Stevens.

- Eg síggi, at hendan fløgan er givin út á teimum stóru plátufeløgunum EMI og Virgin, og tað vísir, at hann framvegis hevur tað í sær, sigur Magni Christiansen at enda.

Hann verður óivað ein av áhoyrarunum á Summarfestivalinum, tá Shakin´ Stevens trínur á pall leygarkvøldið.

# frá Shaky



*Shakin´ Stevens fer at borðreiða við teimum góðu gomlu hittunum, sum vit kenna úr áttatiárunum, tá Shaky framleiddi eina landaplágu fyri og aðra eftir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hann fer sjálvandi at spæla øll tey góðu gomlu hittini, ið gjørdu hann til tann best umtókta tónleikaran í Bretlandi í áttatiárunum, um vit nýta hitlistan sum barometur. Frá 1980-89 er Shakin´ Stevens tann best umboðaði tónleikarin á bretsku hitlistunum.

## Comeback

Shakin´ Stevens gavst at taka upp nýggj løg í 1993, tá áhugin fyri hansara tónleiki samstundis minkaði.

- Vit steðgaðu at taka upp í 1993, men eg gavst ongantíð við at spæla live, og tað hevur hildið meg koyrandi, sigur Shakin´ Stevens.

Tað løgna við Shakin´ Stevens er, at hann gjørdist heimskendur í áttatiárunum fyri gamaldags rock n´ roll, sum hann var ein sannur meistari í at framføra.

- Rock n´roll er eitt breitt hugtak, og tað kann síggjast aftur í nógvum ymsum tónleikagreinum. Tað týdningarmiklasta í mínum tónleiki er ein "good-feel-factor", sum ger folk glað og løtt í sinni, sigur Shakin´ Stevens um sín egna tónleik.

Nú nógv ár seinni hevur hann gjørt eitt satt comeback á tí norðurevropeiska tónleikapallinum, og hann hevur ligið ovalaga á teimum bretsku og norðurlendsku hitlistunum við nýggjastu savnsfløgu sínari.

- Tað er við tónleiki sum við móta. Tað gongur runt sum í einum hjóli, og alt verður tikið fram aftur fyrr ella seinni, sigur Shaky, tá hann verður spurdur, hvussu tað ber til, at hann framvegis kann selja fløgur.

## Longd konsertferð

Fyri stuttum boðaði hann frá, at hann longdi konsertferðina hjá sær, og tað boðar frá, at veiggj framvegis er í manninum hóast sín heldur høga aldur.

Hóast Shakin´ Stevens var eitt stórt navn í áttatiárunum, fall hann ongantíð fyri freistingini við hørðum rúsevnum.

- Eg var somikið heppin, at eg ongantíð datt í ta grøvina, har eg varð noyddur at taka rúsevnir, og tað eri eg glaður fyri, sigur Shakin´ Stevens um áttatiárini, tá hann livdi við fullari ferð við konsertum, upptøkum og einum ótali av samrøðum við tíðindafólk.

Shakin´ Stevens arbeiðir í løtuni við eini nýggjari fløgu, sum eftir ætlan kemur út um nakrar mánaðir. Nakað av nýggjum tilfari verður á hesi fløguni, men eisini nøkur gomul coverløg.

Shakin´ Stevens legði annars fyri á tíðindafundinum við at siga, at hann var bergtikin av náttúruni her í Føroyum, og hann gleddi seg til at fara ein túr við báti fríggjadagin.